# BÚSTAÐAPOLITIKKUR
## LANDSINS



Almannamálaráðið
Fíggjarmálaráðið

# Innihaldsyvirlit

Fororð ..... 4
Samandráttur ..... 5
Innleiðing ..... 6
Nøktandi bústaðir ..... 6
Eigara- og lutaeigarabústaðir ..... 6
Leigubústaðir ..... 7
Vardir bústaðir ..... 8
Leiklutur kommununar ..... 8
Føroya Bústaðafelag ..... 8
Samanumtøka ..... 9

## Fororð

Okkara visjón er, at allir føroyingar hava atgongd til ein góðan og tryggan bústað. Góðir bústaðir eru ein grundleggjandi súla í einum vælvirkandi vælferðarsamfelagi. Bústaðapolitikkur er tí vælferðarpolitikkur og øvugt.

Stóru samfelagsligu avbjóðingarnar við tørvandi fólkavøkstri og skeivu demografisku samansetingini við stórum undirskoti av kvinnum krevja stór politisk átøk. Ein aktivur bústaðapolitikkur er sjálvsagdur í hesum høpi.

Yvirskipaða málið er, at flest øll skulu vera sjálvhjálpin og við sínari inntøku sjálvi fáa til vega egnan bústað. Politiska uppgávan er at tryggja, at útboðið av bústøðum og kostnaðurin eru á einum støði, so menniskju – uttan mun til, hvar tey eru í lívinum – fáa nøktandi heim í mun til teirra tørv.

Tí er týdningarmikið at hava ein fjøltáttaðan og dynamiskan bústaðamarknað, sum møtir tørvinum hjá tí einstaka: ungum, lesandi, støkum, barnafamiljum, eldri og fólki við serligum avbjóðingum.

Í løtuni fevnir føroyski bústaðamarknaðurin í høvuðsheitum um eigarabústaðir. Bústaðamarknaðurin í Føroyum er tí fátáttaður samanborin við bústaðamarknaðirnar, sum vit kenna í okkara grannalondum. Fátáttaða bústaðamynstrið er ein týðandi liður í, at fólkið ikki fjølgast í Føroyum.

Henda veruleika ynskja vit nú at broyta. Við miðvísum ætlanum og í tøttum samstarvi við kommunurnar og Føroya Bústaðafelag fara vit nú undir at tryggja øllum atgongd til ein góðan og tryggan bústað.

Flest øll eru samd um, at bústaðurin skal nøkta tann grundleggjandi tørvin á tryggleika og trygd fyri lív og heilsu. Bústaðurin er, har tú kanst hvíla.

Men bústaðurin er eisini annað. Ein góður og tryggur bústaður er fyritreytin fyri inklusión, virkni og luttøku í samfelagnum. Ein góður og tryggur bústaður er grundarlagið undir sømiligari menniskjaligari tilveru.

Tað er tí avgerandi neyðugt fyri lívsgóðskuna hjá fólki og fyri vælferðina í samfelagnum, at flest møgulig fáa møguleikan at búgva trygt og væl.

Endamálið við arbeiðinum, sum nú er farið í gongd, er, at føroyski bústaðamarknaðurin ikki longur skal útihýsa, men fevna. At øll í Føroyum kunnu búgva væl, lið um lið.

Føroya Landsstýri, tann 26. oktober 2012

Annika Olsen og Jørgen Niclasen
landsstýriskvinna landsstýrismaður

## Samandráttur

Endamálið við Bústaðapolitikki Landsins er, at øll í Føroyum skulu búgva væl, undir nøktandi og skipaðum viðurskiftum, og at føroyski bústaðamarknaðurin verður inkluderandi, soleiðis at allir samfelagsbólkar búgva lið um lið.

*Eigara- og lutaeigarabústaðir*

At eiga sín egna bústað gevur tryggleika og er ynski hjá mongum. Við lutaíbúðalógini og við í størri mun at javnseta allar bústaðir, verða tað fleiri, ið kunnu gera dreymin um egnan, ella annan meira hóskandi bústað, til veruleika. Størri útboð av alternativum bústøðum gevur størri umferð í bústaðamarknaðin og harvið fleiri bústaðamøguleikar til m.a. ungar barnafamiljur.

Landið veitir rentustuðul til bústaðalán til einstaklingar og til lutaíbúðafeløg, og kommunurnar kunnu útvega grundøkið til ein lagaligan kostnað.

*Leigubústaðir*

Stórur tørvur er á góðum leigubústøðum kring alt landið. Útboðið á tíðarhóskandi leigubústøðum skal økjast, og verður hetta m.a gjørt við fíggjarliga at javnseta allar bústaðir.

Føroya Bústaðafelag kann saman við kommununum átaka sær at útvega leigubústaðir, ið øll eiga at hava somu atgongd til. Tó eiga fólk, ið vegna almannahending, av heilsuligum- ella sosialum ávum hava tørv á einum leigubústaði, at fáa framíhjárætt til ein part av leigubústøðunum, sum Føroya Bústaðafelag umsitur.

Kostnaðarstøðið á leigubústøðum umvegis Føroya Bústaðafelag verður hildið á nøktandi støði við lagaligari fígging frá Føroya Bústaðafelag, mvg-afturbering og kommunalum grundøki og byggibúning til lagaligar afturgjaldstreytir. Hesir fyrimunir skulu málrættast hesum leigubústøðum.

*Vardir bústaðir*

Útboðið á vardum bústøðum til fólk, ið vegna varandi avmarkaðan likamligan ella sálarligan førleika hava tørv á einum vardum bústaði, verður víðkað.

*Bústaðapolitiskt amboð*

Føroya Bústaðafelag verður eitt av bústaðapolitisku amboðunum, ið skal fremja Bústaðapolitikk Landsins í verki.

Umframt at veita fígging og útvega bústaðir, veitir Føroya Bústaðafelag ráðgeving og umsiting av leigubústøðum og lutaíbúðafeløgum og vil arbeiða fyri skipaðum viðurskiftum á leigu- og lutaíbúðamarknaðinum.

## Innleiðing

Mong tey seinastu árini hevur breið semja verið í politisku skipanini um, at føroyski bústaðamaknaðurin er einstáttaður og ótíðarhóskandi. Nógv tann størsti parturin av føroyska bústaðamarknaðinum eru vanlig sethús, nakað er av eigaraíbúðum, meðan talið og úrvalið av leiguíbúðum er rættiliga avmarkað. Skiftandi samgongur hava sett stórt fokus á bústaðamál við atliti til at útvega alternativar bústaðir og at fáa størri umferð í bústaðamarknaðin, og hevur Húsalánsgrunnurin, nú Føroya Bústaðafelag, verið ætlað sum bústaðapolitiska amboðið.

Nýggj leigulóg og nýggj lutaíbúðalóg eru settar í gildi. Broytingar eru gjørdar í rentustuðuls- og mvg-lógunum, og lív er blást í Húsalánsgrunnin, nú Føroya Bústaðafelag, við nýggjum heimildum at fíggja, umsita og útvega bústaðir.

Við nýggju amboðunum kann føroyski bústaðamarknaðurin gerast munandi meira fjøltáttaður, við einum breiðum úrvali av leigu- og lutaíbúðum kring landið, og til ein og hvønn bústaðatørv.

## Nøktandi bústaðir

Nøktandi bústaðaviðurskifti er ein av grundarsteinunum í einum vælferðarsamfelagi. Bústaðurin er grundarlagið undir einum virðiligum lívi, er fortreytin fyri góðari heilsu, arbeiði, útbúgving og luttøku í samfelagnum annars.

Sambært Europeiska Mannarættindasáttmálanum um búskaparlig, sosial og mentanarlig rættindi, ið var settur í gildi fyri Føroyar í 1976, viðurkenna vit rættin hjá einum og hvørjum til ein nøktandi livifót, undir hesum hóskandi klæði, føði og bústað.

Bústaðurin er tengdur at eini røð av lívsins viðurskiftum. Bústaðurin er ikki einans ein íløga, men er tak yvir høvdið, eitt heim, eitt grannalag og eitt pláss í samfelagnum.

Yvirskipaða málið er, at øll skulu búgva væl - lið um lið.

## Eigara- og lutaeigarabústaðir

Bústaðapolitisku átøkini hava seinastu mongu árini stuðlað undir, at fólk skulu eiga sín egna bústað – sítt egna heim. Landið hevur veitt rentustuðul til bústaðalán, og kommunurnar hava veitt grundøki til ein lagaligan kostnað.

Við einum alsamt øktum kostnaðarstøði eru bústaðatilboðini í meginøkjunum dýr sethús og eigaraíbúðir, ein óskipaður leigumarknaður og nærum ongar lutaíbúðir. Uttanfyri meginøkini eru oftast bert sethús, sum oftani eru trupul at fíggja og ikki nóg umsetilig.

Við nýggju lutaíbúðalógini kunnu fólk nú í størri mun útvega sær sín egna bústað. Fleiri fyrimunir eru við lutaíbúðum. Broytingar eru gjørdar í rentustuðulslógini, soleiðis at lutaíbúðir verða javnsettar við aðrar eigarabústaðir, men innskotið í eitt lutaíbúðafelag er

lægri enn í eigarabústaðir, og harvið er fíggjarliga bindingin lægri, eins og lutaíbúðir kunnu væntast at verða lættari umsetiligar enn eigaraíbúðir.

At útvega sær sín egna bústað er størsta íløgan í lívinum og ein tyngjandi postur í privatbúskapinum, men at eiga sín bústað gevur samstundis tryggleika, og er helst ynski hjá fólkum flest.

## Leigubústaðir

Hóast fólk flest framvegis helst ynskja at eiga sín egna bústað, kunnu fleiri orsøkir vera til, at fólk ynskja at búgva til leigu, undir tryggum og skipaðum viðurskiftum.

Øll eru ikki før fyri at útvega sær sín egna bústað, og er størsta orsøkin helst fíggjarlig. Eisini kunnu avmarkaðir likamligir og/ella sálarligir førleikar forða einum í at ogna sær sín egna bústað. Størri fíggjarligt og persónligt frælsi er somuleiðis ein av orsøkunum til, at fólk velja leigubústað heldur enn eigarabústað.

Verandi leigumarknaður er óskipaður. Dygd og prísur eru ikki altíð sambærlig. Fólk, ið leingi og óviljað búgva til leigu, noyðast týðum at flyta, og sum eina avleiðing kenna manglandi tryggleika og tilknýti.

Tað er umráðandi, at føroyski bústaðamarknaðurin verður meira nútíðarhóskandi og inkluderandi við einum breiðum úrvali av leigubústøðum kring alt landið til fólk, sum í dag ikki hava møguleika at finna ein hóskiligan bústað undir tryggum viðurskiftum.

Talið av leigubústøðum skal økjast. Við at økja um útboðið á dygdargóðum leigubústøðum, vil kostnaðarstøðið á leigubústøðum, kanska serliga í høvuðsstaðnum, helst falla í eina meira hóskandi legu.

Føroya Bústaðafelag útvegar, einsamalt ella saman við kommunum, feløgum og stovnum leigubústaðir.

Leigubústaðir umvegis Føroya Bústaðafelag eru sermerktir við, at talan er um leigubústaðir til øll og við teimum fyrimunum, sum eru til taks, til tess at fáa kostnaðarstøðið niður. Húsaleigan verður ásett í mun til veruliga kostnaðin, sum er afturgjald av lániskuld, viðlíkahald og umsiting.

Talan er um leigubústaðir til fjøldina - góðir fyri øll og alneyðugir fyri nøkur. Leigubústaðir umvegis Føroya Bústaðafelag bera øll lívsskeið, eru atkomuligir og hava algilt snið, ið stuðlar undir inklusión og at fólk kunnu vera sum longst í egnum heimi.

Umframt at veita bústað til tann breiða hópin, skal ein partur av leigubústøðunum umvegis Føroya Bústaðafelag málrættast til bústaðasosial endamál, soleiðis at persónar, ið vegna almannahending, av heilsuligum- ella sosialum ávum hava tørv á einum leigubústaði, fáa framíhjárætt til ein part av leigubústøðunum, sum Føroya Bústaðafelag umsitur.

## Vardir bústaðir

Sambært § 19 a í Breksáttmálanum skulu fólk, ið bera brek, sleppa at velja sær bústað og velja hvar og saman við hvørjum, tey vilja liva - á jøvnum føti við onnur - og tey skulu ikki vera noydd at liva í serligum bústøðum.

Stórur tørvur er á at fáa til vega fleiri og tíðarhóskandi bústaðir til fólk, ið vegna varandi avmarkaðan likamligan ella sálarligan førleika hava tørv á einum vardum bústaði.

Vardir bústaðir, skipaðir sum sambýli, búfelagsskapir ella røktarbústaðir, eru bústaðir til fólk, ið ikki kunnu búgva í sjálvstøðugum bústøðum úti í samfelagnum, men sum hava tørv á sosialpedagogiskum stuðli, felags virksemi og felagsskapi út yvir vanligt grannalag, umframt møguligari røkt og viðgerð.

Vardir bústaðir verða góðkendir sambært § 32 í forsorgarlógini.

Sambýli eru sermerkt við sjálvstøðugum íbúðum, felagshøli og felags virksemi. Sambýli eru fyri fólk við umfatandi tørvi á sosialpedagogiskari hjálp og vegleiðing.

Búfelagsskapir eru sermerktir við samanbygdum ella tættliggjandi sjálvstøðugar íbúðum við egnari inngongd og møguligum felagshøli. Búfelagsskapir eru fyri fólk, ið ikki hava eins stóran tørv á sosialpedagogiskari hjálp og vegleiðing, sum búfólk á sambýlum.

Røktarbústaðir eru fyri fólk, ið tørva varandi røkt og støðuga hjáveru.

Bústaðarumstøðurnar hava stóra ávirkan á frælsi og sjálvbjargni hjá tí einstaka búfólkinum. Við nøktandi bústaðarumstøðum kunnu atlit í størri mun takast til tørv, ynski og førleikar hjá tí einstaka borgaranum, umframt at bústaðarumstøðurnar í stóran mun skapa karmar fyri øðrum sjálvsøgdum rættindum, sum eitt nú øktum sjálvræði og sjálvsavgerðarrætti, umframt rættinum til heima- og privatlív. Øll, uttan mun til brek, skulu hava møguleikan at skapa eitt heim við støði í egnum ynskjum og tørvi.

## Leiklutur kommununar

Kommunurnar kunnu viðvirka til og átaka sær at útvega leigubústaðir, eins og kommunurnar kunnu átaka sær at útvega kommunal grundøki – møguliga til lagaligar treytir.

Við nýggju heimildunum kann Føroya Bústaðafelag saman við m.a. kommunum og øðrum fáa til vega eitt fjølbroytt úrval av ymiskum bústøðum kring alt landið.

Kommunurnar hava ein týðandi leiklut í at fremja almenna bústaðapolitikkin í verki og at leggja til rættis kommunala bústaðabygging á ein hátt, ið tryggjar inkludering og trivnað fyri allar samfelagsbólkar.

## Føroya Bústaðafelag

Føroya Bústaðafelag er eitt av bústaðapolitisku amboðunum, ið skal viðvirka til at fremja Bústaðapolitikk Landsins í verki.

Endamálið við Føroya Bústaðafelag er:
- at virka fyri at øll í Føroyum skulu hava møguleika fyri at útvega sær ein bústað,
- at tryggja fjølbroytni á bústaðamarknaðinum, og
- at stuðla undir Veðurlagspolitikk Føroya og at minka um orkutørvin á føroyska bústaðamarknaðinum.

Heimildir hjá Føroya Bústaðafelag fyri at røkka hesum endamáli eru:
- at veita lagaliga fígging til orkusparandi tiltøk á føroyska sethúsa- og íbúðamarknaðinum,
- at veita veðskuldarlán til íbúðafeløg og íbúðastovnar,
- at útvega, reka og leiga út íbúðir, íbúðahús og lestrarbýlir, og
- at veita realkredittfígging til føroyska bústaðamarknaðin.

Føroya Bústaðafelag vil stimbra og virka fyri, at áhugafeløg og kommunur saman við Føroya Bústaðafelag skapa nýggjar, kreativar og hóskandi bústaðaloysnir, soleiðis at bústaðamarknaðurin verður betri, bíligari og meira fjøltáttaður.

Føroya Bústaðafelag bjóðar ráðgeving, umsiting, fígging og luttøku ella eigaraskap til kommunalar- og aðrar bústaðaverkætlanir kring landið.

Føroya Bústaðafelag tryggjar skipaði viðurskifti á leigu- og lutaíbúðamarknaðinum, tryggjar, at dygdin er í lagi, og at umvælingar- og fíggjarkarmar eru hóskandi.

Føroya Bústaðafelag arbeiðir við:
- at fáa skipaði viðurskifti á leigumarknaðinum,
- at fáa eitt størri og meira fjøltáttað útboð av bústøðum kring alt landið,
- at fáa samskipaði tilboð til øll í samstarv við kommunalar myndugleikar og landsmyndugleikar,
- at tryggja viðlíkahald og støðugar nýggjar íløgur, og
- at fáa skipað eitt burðardygt virkisøki við dygd, leigarum at gagni.

Føroya Bústaðafelag er limur í Boligselskabernes Landsforening.

## Samanumtøka

Samanumtikið vil Bústaðapolitikkur Landsins tryggja fjølbroyttar og tíðarhóskandi bústaðir til fólk í Føroyum og fáa størri umferð í bústaðamarknaðin.

Harumframt er Bústaðapolitikkur Landsins ein týðandi liður í at avmarka fólkafráflyting, at tryggja, at kvinnur í størri mun fáa frælsi at liva og virka í føroyska samfelagnum, og at virka fyri størri kapitali til føroyska samfelagið, bæði umvegis beinleiðis fígging frá Føroya Bústaðafelag, men eisini við, at íleggjarar nú í størri mun kunnu gera íløgur í Føroyum heldur enn uttanlands.